# ítróttur

Nr. 81 • leygardagur • 30. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


Stjørnan-VB:

## Til Klaksvíkar eftir gullinum

**Leygardagin verður seinasti dysturin í Sunset-kappingini hjá kvinnum leiktur. Tá bresta tey bæði sterkastu liðini í kappingini, Stjørnan og VB, saman í Klaksvík. Hóast Stjørnan á pappírinum hevur møguleikan at fáa VB aftur, so ivast eingin í, at vágskvinnur fara suður aftur við gullinum leygardagin**


UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Stjørnan og VB hava verið at kalla einaráðandi í føroyskum kvinnuhondbólti seinnu árini, og tað er tí neyvan av tilvild, at júst hesi bæði lið hittast í seinasta dystinum í hesum hondbóltsárinum. Undan dystinum er støðan tann, at VB er so gott sum meistari. Um Stjørnan ætlar sær at endurvinna meistaraheitið, skulu tær vinna dystin móti VB við nærum tríati málum. Sjálvt ikki teir mest bjartskygdu klaksvíkingarnir trúgva uppá, at tað fer at eydnast.

### Lítil áhugi fyri kappingini

Tað skerst ikki burtur, at nógv rumbul hevur verið í miðlunum um hondbóltskappingina hjá kvinnum í ár. Fleiri venjarar hava verið frammi alment og sagt, at teir halda kappingina verða fullkomiliga burturvið, soleiðis sum hon hevur verið skipað í ár.

Meðan menninir vóru lidnir at spæla sína kapping miðskeiðis í farna mánað, verða kvinnurnar ikki lidnar fyrr enn nú leygardag, altso ikki minni enn seks vikur seinni enn menninir. Tá ið eisini verður havt í huga, at tey flestu liðini í Sunset-kappingini einki hava havt at spæla fyri seinastu mongu dystirnar, er eyðsæð, at glansurin fer av kappingini.

VB og Stjørnan eru í einum flokki fyri seg, og tí eru tað bert innanhýsis dystirnir millum hesi bæði lið, sum hava nakran serligan áhuga millum manna. Hini liðini standa als ikki vágskvinnum og klaksvíkskvinnum mát, og í nógvum førum hevur talan verið um eyðmýkingar, tá ið okkurt av aftaru liðunum hevur spælt móti annaðhvørt VB ella Stjørnuni.

Ein av orsøkunum til, at hesi bæði liðini eru so einaráðandi, er allarhelst tann, at feløgini VB og Stjørnan tykjast verða tey einastu, har nógv orka veruliga verður lagt í kvinnuliði. Hvørki VB ella Stjørnan eru umboðaði í bestu mansdeildini, og hetta sæst eisini aftur. Tað er tíverri mangan so, at leiðslurnar í feløgunum velja at leggja størstu fíggjarligu orkuna í mansliðini heldur enn kvinnuliðini, og tað er óivað við til at gera munin á liðunum í kvinnudeildini so stóran.

Í ár hevur kappingin verið ógvuliga lítið spennandi, og í flestu førum vóru úrslitini av dystunum greið frammanundan. Hetta hevur gjørt sítt til, at tað hevur verið sera lítil áhugi fyri kvinnukappingini í ár.

Men leygardagin fara tey bæði bestu liðini á vøllin í Klaksvík, og tá ber til at síggja hondbólt, tá ið hann er bestur. Um dysturin bara verður helvtina so spennandi sum seinasta uppgerðin millum hesi bæði feløg, tá ið liðini hittust í Vági í mars mánað, so er vist, at áskoðararnir fáa nakað fyri pengarnar.



*Hóast meistaraheitið at kalla er avgjørt, so er lítið at ivast í, at seinasti dysturin á árinum fer at geva áskoðarunum valuta fyri pengarnar*

---

Rannvá Augustinussen, VB

## - Skulu vinna síðsta dystin

**Liðskiparin hjá VB, Rannvá Augustinussen, væntar ikki, at talan verður um nakan lættan dyst hjá VB í Klaksvík leygardagin**


VB
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Alt bendir á, at Rannvá Augustinussen leygardagin fyri fyrstu ferð kann taka ímóti FM-steypinum í kvinnuhondbólti. Kappingarárið í ár er fyrsta árið hjá henni sum liðskipari hjá VB, og ikki kann sigast annað, enn at tað hevur gingið gott.

- Vit ætla okkum at enda árið ordiligt við at vinna á Stjørnuni, men tað verður ikki lætt. Eg ivist ikki í, at tær ætla at vísa nakað, og vit kunnu vænta okkum ein truplan dyst, heldur VB-liðskiparin.

Rannvá Augustinussen sigur, at hesar seinastu vikurnar hevur kappingin verið sera lítið hugalig, tí dystirnir hava einki havt upp á seg.

- Tað hevur verið ræðuligt. Eingin hevur havt nakað at spælt fyri, og tað hevur virkað sum um, at dystirnir bara hava verið nakað, ið skuldi avgreiðast, sigur hon.

Rannvá sigur, at vágbingar væntandi fara manssterkir til Klaksvíkar leygardagin at taka ímóti gullinum, og hon ivast ikki í, at tað verður skipað fyri onkrari veitslu í Vági leygarkvøldið.

Dysturin móti Stjørnuni verður eisini sermerktur á tann hátt, at onkur spælari á VB-liðnum takkar fyri seg.

- Arnleyð Hjelm hevur boðað frá, at hon fer at gevast. Eisini er greitt, at Aukse Vysniaskaite leygardagin spælir sín síðsta dyst fyri VB. Hon hevur leingi sagt, at heimlongsulin er so mikið stórur, at tá ið hetta kappingarárið var av, kom hon ikki aftur til Føroya at spæla, greiðir Rannvá Augustinussen frá.

Sjálv býr Rannvá eisini í Havn, og tað er tí nærliggjandi at spyrja, hvussu leingi hon fer at blíva við at ferðast suður í vikuskiftinum at spæla dystir, ella um hon fer at skifta til eitt av feløgunum í meginøkinum.

- Tað er strævið ikki at fáa vant regluliga saman við hinum, men eg vænti ikki, at eg fái loyvi til at skifta í okkurt annað felag, heldur Rannvá skemtandi fyri. Hon leggur afturat, at hóast tað mangan er troyttandi, so uppvigast tað av, at tá ið man spælir við VB, so veitst tú, at møguleikin fyri at vinna gull er góður.

---

Bára Skaale Klakstein, Stjørnan:

## - Hava vant miðvíst til dystin

**Ein av veteranunum hjá Stjørnuni er kviki vongspælarin Bára Skaale Klakstein. Hon sigur, at í Stjørnuni hava tær í fleiri vikur vant við dystinum móti VB fyri eyga.**


STJØRNAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Hóast útlitini fyri at Stjørnan leygardagin kann endurvinna meistaraheitið, so sigur Bára Skaale Klakstein, at tær eru ógvuliga uppsettar til dystin móti VB.

- Tað er einki at ivast í, at vit gleðu okkum til dystin móti VB. Vit vilja fegnar enda árið við maner, og tað skal gerast við at vinna á VB, hóast tað neyvan fer at røkka til FM, sigur Bára.

Hon greiður frá, at seinastu 12 árini hava føroyameistararnir í kvinnuhondbólti vunnið seinasta dystin á árinum, men tann gongdin skal steðgast í ár.

Stjørnan hevur allar sínar leikarar klárar til dystin móti vágskvinnum, og hóast kappingin av álvara er dovnað seinastu vikurnar, so sigur Bára, at hetta ikki hevur sæst aftur undir venjing hjá Stjørnuni.

- Vit hava vant sum vanligt allatíðina, og uppmøtingin til venjingarnar hevur verið góð. Vit hava vant við dystinum móti VB fyri eyga, og vit ætla okkum at prógva leygardagin, at vit eru líka góðar sum tær, sigur Bára Skaale Klakstein.

Spurd um uppbakningurin hjá Stjørnuni er tann sami, nú fótbólturin er farin í gongd, sigur Bára:

- Tað sæst týðuligani aftur í høllini, at fótbólturin er byrjaður aftur, serliga um veðrið er gott. Men eg ivist ikki í, at tað verða nógvir klaksvíkingar til dystin hjá okkum leygardagin, millum annað tí at KÍ ikki spælir fyrr enn sunnudagin, og so plaga dystirnir millum Stjørnuna og VB eisini at verða rættuliga góðir og spennandi, sigur Bára Skaale Klakstein.